# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Alla halgannadag 1. nov. Minningargudstænasta teirra sjólátnu**
***Havnar kirkja:*** kl. 20 Hans J. Joensen, biskupur
***Haldarsvík:*** kl. 15, Mogens Tilsted Christensen
***Christianskirkjan:*** kl. 20. Minningargudstænasta teirra sjólátnu, Magnus Brahé Jørgensen
***Gjógv:*** kl. 12, Emil Olsen
***Eiði:*** kl. 15.30, Emil Olsen
***Tvøroyrar kirkja:*** Allahalgannadag verður minningarhald kl. 13.30. Aftaná verður farið út á minnisvarðan, har kransar verða lagdir
***Vágur:*** kl. 15, Patrick de Neergaard

**Gudstænastur Alla halganna sunnudag**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Kristine Hestbech. ***Talvan gongur fyri Einkjugrunnin***
***Hoyvíkar kirkja:*** kl 11, ***Hans J. Joensen, biskupur vígir Hoyvíkar kirkju, Kl. 18*** Sonja Klein, altargangur
***Vesturkirkjan:*** kl.11.00 Lestur. ***Talvan gongur fyri einkjugrunnin***
***Argir:*** kl.11.00 Lestur. ***Talvan gongur fyri einkjugrunnin***
***Hvalba:*** kl 12.30 Símun Jacobsen altargong***. Talvan gongur fyri einkjugrunnin***
***Sandvík:*** kl. 18, Símun Jacobsen. ***Talvan gongur fyri einkjugrunnin***
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen. ***Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Einkugrunnin***
***Mikladalur:*** kl. 12, altarg., Magnus Brahé Jørgensen.
***Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Einkjugrunnin.***
***Vágur:*** kl. 11, Dópur,
***Porkeri:*** kl. 12, Patrick de Neergaard

**Aftankvirra í Havnar kirkju**
Fríggjakvøldið 2. november kl. 21 – 23.
Kl. 22. syngur Arina Bischoff og Gudmund Mortensen, organistur hevur fylgispælið. Kl. 22.30 andakt við Kristine Stricker Hestbech.

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 3. november kl. 19.30 Aglowmøti í Evangeliihúsinum.
http://www.aglow.fo

**Samkoman Lívdin**
Vegna legur á Zarepta frá 2.- 4. nov., verður onki møti hesa vikuna.

**Frelsunarherurin, Torshavn**
Mikudag kl. 15 Bønarløta. Hósdag einki HFB (Minnist til árasøluna 8. november). Sunnudag møtir kl. 11 og kl. 18. Sunnudagsskúli kl. 14. suppa, sápa og frelsa síðan 1865.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v. Hans Karl Højgaard, Titusbrævið.
Hósdagin kl. 16.00-16.45 venur gentukórið - fyri gentur frá 2. flokki.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Heina S. Christiansen, evni: Kristin í gerandisdegnum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v. Hanus Simonsen, presti. Jens Lisberg syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Hóskvøldið einki ungdómsmøti vegna felags ungdómsmøti fríggjakvøldið í Filadelfia.
Sunnudagin kl. 14 familjuguðstænasta.
Mánadagin kl. 17.15 venur barnakórið, kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagin 1. nov. Eingin bíbliutími vegna Alla Halganna dag.
Fríggjadagin kl. 20 Heystmøti við Thorkild Højvig.
Evnið: Leiða til Kristus (1)
Sangur: Jan og Hans Pauli, Kolbeinagjógv.
Leygarkvøldið kl. 20 Heystmøti við Thorkild Højvig.
Evnið: At liva í Kristusi.
Sangur: Tær tríggjar har vesturi.
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagsskúli, kl. 18 Heystmøti við Thorkild Højvig.
Evnið: Leiða til Kristus (2)
Sangur: Manskórið í Thabor í Fuglafirði.
Mánadagin 5. nov. kl. 20 Kvinnubólkurin kemur saman. Sólborg Dulavík tosar um evnið: »Hvussu møti eg menniskjum í kreppu, og hvat ger tað við meg?«
- Um royndir og broytingar sum fyrsti leiðari á Blákrossheiminum.
Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar!
Øll hjartaliga vælkomin!
Sí annars www.koma.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikudagin kl. 17.15 venur barnakórið.
Hósdagin kl. 16 eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 21 felags ungdómsmøti í Filadelfia.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl 18 lovsangur og tilbiðjan Linda Petersen talar.
Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Oasuni.
http://www.gospel.fo

**Adventkirkjan**
Mikukvøldið kl. 19, er bíbliuskeið í Dánielsbók. J.V. Danielsen er skeiðleiðari.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Hóskvøldið 1. november verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í Kerit, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Ebenezer**
Týsdag kl. 18.55 Sangvenjing – Gospel Hearts,
kl. 20.00 Sangvenjing - Ebenezerkórið.
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdag kl. 20 Ungdómsmøti - Talari: Reimund Langgaard.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti - Klaksvíksingar luttaka.
Mánadag kl. 12.30 Andakt.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Møtirøð við Moses Hansen**
Mikudagin 31. okt. kl. 20 møti í Getsemane, Klaksvík.
Fríggjadagin kl. 21 felags ungdómsmøti í Filadelfia, Tórshavn.
Leygardagur kl. 21 ungdómsmøti í Kelduni, Skálabotnur.
Sunnudagin kl. 10.45 møti í Filadelfia, Tórshavn.

**Hebron, Argir**
Mikudagin 31. okt. kl. 20 Bíbliutími og bønarløta.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekka. Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Anna og Oystein Petersen greiða frá missiónskunningarferð á Filipsoyggjunum.
Sunnudagsskúlin er hvønn sunnudag kl. 12. Øll børn eru hjartaliga vælkomin.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Katólska Kirkjan**
Fyri tey, sum lesa »True Life in God« Satt lív í Gud. Bønarløta verður týskvøldið 30. oktober kl. 19.30 í Mariukirkjuni. www.katolsk.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17.00 bøn fyri Ísrael og Býnum kl. 18.00-19.45 Delli (3. til 6. fl.) kl. 20.00-22.00 Chill (7. til 10. fl.)
Fríggjakvøldið kl. 21.00 Felags ungdómsmøti v/ Moses Hansen
Leygarkvøldið verður einki Flare
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti v/ Moses Hansen kl. 11.30 Barnagudstænasta
Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarfundur í Oasuni
www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel Brekkutún 3, Hoyvík**
Mikukvøld 31. okt kl. 20 Bíbliutími.
www.immanuel.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir.
Mikudagin kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla. Holdini hjá Hera Joensen og Hanusi Simonsen.
Mikudagin kl. 19 í FKUM: Ten-sing kórið venur.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

**Sandavágs Meinigheitshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mikukvøldið 31.10. kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar. Mint verður á jólapakkarnar.

**Vakhús - Sandavágur**
Evangelisk møti verða í Vakhúsi í Sandavági v/ Tórmund Hansen og fleiri leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Herman, Gigga og fleiri syngja.
Drekkamuður verður aftaná.

**Salem - Ungdómsmøti**
Ungdómsmøti verður í Salem leygarkvøldið kl. 21, øll eru vælkomin.

**Miðvágur - Minningarhald**
Minningarhald teirra sjólátnu verður við minnisvarðan í Miðvági alla halganna dag (1. nov.) kl. 15. David Johannesen, sóknarprestur talar. Sálmabókin verður nýtt. Um ikki viðrar verður minningarhaldið í kirkjuni.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.

**KEDRON í Sørvági**
Mikudagin 31.10.2007.
Húsbólkarnir møtast hjá teimum ymisku, onki Bønarmøti verður í Kedron.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Týsdagin 30/10, bønarmøti hjá Odnhild Jacobsen, Flatnavegur, klokkan 20.
Mikudagin ungdómsmøti í Saron klokkan 20.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við breyðbróting.
Verið vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarløta hóskvøldið kl. 19.30
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Zion, Kollafjørður**
Mikudagin 31. okt. kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Kvinnumøti v/ Elsu Djurhuus.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 11.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 18 Familjumøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónsvikurnar í Tjørnuvík og Vík**
verða í næstum - í Tjørnuvík í døgunum 8. til 11. november og í Vík frá 15. til 18. november. Nærri verður lýst seinni.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Týsdagin kl. 17.30 Liljur.
Mikukvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 18 Tim5.
Sunnudagin kl. 17 Møti.

**Berøa, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19.30 Húsbólkar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Moses Hansen úr DK.
Sunnudagin kl. 17, Sangmøti við Eyðun, Mirjam, Kristinu, Terja, Mariu og Jastrid
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna

**Getsemane, á Brekku 19**
Mikukvøldið kl. 20 er møti við Moses Hansen.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti, Poul Nicolai Steinberg talar.
Leygarmorgun kl. 10 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 18 er møti, barnamøti (sunnudagsskúli ) er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøld kl. 20 hugnakvøld fyri ung.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti. v/Jónbjørn Nýggjagarð.
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Leivur í Buð og Olvheðin Jacobsen.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti.

**Aglow Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria.
Týskvøldið 6. nov kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**KFUM & K, Klaksvík**
Mikudagin, 31. okt kl. 20 - Bíbiltími.

**Betania, Skopun**
Týsdag kl. 19 Ungdómurin kemur saman.
Mikudag kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónshúsð í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 2,1-17.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn- & lovsangur, kl. 18 møti v/Jógvan Lamhauge sum sigur frá Ísraelsferð. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Minningarhald í Porkeri**
Minningarhald teirra sjálátnu verður við minnisvarðan í Porkeri 1. nov. kl. 15. Jóannis Mortensen talar og kransur verður lagdur.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið 6. nov. Mint verður á jólapakkarnar.

**Frelsunarherurin í Vági**
Mikudagin kl 18.30 bøn, kl. 20 heimaforbund.

Hósdagin kl. 19.30 streingjakórið øvar, øll eru vælkomin at syngja við.
Leyardagin kl. 19 Árasøla, nógvir góðir vinningar, matur, olja oa. eisini verður sangur og kaffi.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagskúli. Kl 18 evang møti, Ben Eli og fleiri. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið, Sumba**
Møti verður við Árna & Ásbjørg sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eysturoyar gongufelag - Jólaborðhald**
verður í Gjáargarði fyri limir í Eysturoyar gongufelag leygardagin 1. desember. Um tú hevur hug at vera við, so sig frá hjá Asbjørn tlf. 282129, Kristian Martin tlf. 775100 ella Óla tlf. 254272 áðrenn 15. nov.

**Losjan í Havn**
Fríggjadagin kl. 15.00 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Ørkin, Reykjavík**
Møtini vera hvønn sunnudag kl. 17.00 á Ørkini!

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*tlf. 316491 · fax 316481*
*Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mikudagur 31. okt.***
9.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
Tilmelding: 316491 byrjar mikudagin 24. okt.
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
Tilmelding: 316491 byrjar mikudagin 24. okt.
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Sigrid Dalsgaard
12.00 Døgurði
15.00 Túrur við ella uttan stavar. Úr Tilhaldinum, Hálsatjørn og Tórsbyrgi
Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagur 1. nov.***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
Lesibólkurin hittist aftur 22. nov. Bókin: »Í havsins hjarta«, hjá Gunnari Hoydal verður lisin
14.00 – 16.00 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 2. nov.***
10.00 - 13.30 Matgerð v/Anne Grethe Harlou fríggjadag er avlýst fyribils
10.00 - 17.00 Opið hús.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**75 ár**
Í dag, 30. oktobur fyllir Hildibjørg Olsen, Toftir 75 ár. Hon er burturstødd.

**85 ár**
Í dag, 30. oktober verður Louisa Hansen, Klaksvík 85 ár. Hon er burturstødd.